## Christian við eykaliði

Eykaliðið hjá Manchester City spældi um vikuskifti sín fyrsta venjingardyst í summar. Dysturin var ímóti Stalybridge Celtic, og City vann dystin 2-1. Christian Restorff Mouritsen venur viði eykaliðnum hjá Manchester City, og hann byrjaði eisini á vøllinum í hesum venjingardystinum. Christian var tó ikki millum málskjúttarnar. Málið hjá City vardi Kasper Schmeichel, sum er sonur Peter Schmeichel.



## Sven-Gøran vann fyrsta dystin

Manchester City spældi um vikuskiftið sín fyrsta venjingardyst í summar. Nýggi venjarin Sven-Gøran Eriksson kundi fegnast um, at hansara lið vann dystin. Úrslitið gjørdist 3-0 til Manchester City, og tað var kanska ikki nakar óvæntaður sigur, tá ið hugsað verður um, at møtstøðuliðið var Doncaster. Áhugin fyri dystinum og fyri Eriksson annars hevur verið sera stórur, nú fyrrverandi enski landsliðsvenjarin er komin aftur til Onglands at starvast.

# Tveir hava vunnið 30 ferðir

**Bæði Ludvík við Stein og Tóroddur Vang fingu sín 30. sigur í kappróðri, tá Eysturoyingur vann 10-mannafarsróðurin á vestanstevnu**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Eysturoyingur hevur havt nógv at feira seinnu árini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Síðsti róðurin á vestanstevnu var sum vera man róðurin hjá 10-mannaførunum, og her vóru tað bert Eysturoyingur og Vestmenningur, sum vóru við í kappingini. Undan róðrinum vóru teir umborð á Eysturoyingi stórir favorittar at vinna róðurin, men hesu ferð fingu teir ein skarpan gang frá Vestmenningi.

Tað var Vestmenningur, sum fekk betru byrjanini uppá róðurin, men munurin var ongantíð tann heilt stóri. So við og við tók Eysturoyingur inn á teir, og eftir eini løtu fóru teir frá Vestmenningi, og so var líkt til, at vit fóru at fáa enn ein av tryggu sigrunum til Eysturoying, men soleiðis bleiv ikki.

Vestmenningur fekk spenning í aftur róðurin, og leingi var at kalla eingin munur á bátunum. Í endaspurtinum var tó líkt til, at teir umborð á Vestmenningi høvdu brúkt í so nógvar kreftir, tí her megnaðu teir ikki ordiliga at trýsta Eysturoying, sum vann róðurin eina knappa bátslongd framman fyri Eysturoying.

### Halda ikki fram

Eftir róðurin fingu vit orðið á bátsformannin á Eysturoyingi, Ludvík við Stein, sum vann sín 30. FM-róður saman við Tóroddi Vang. Hann var glaður um at vinna harða róðurin.

- Tað var gott at vinna, men vit fingu harða kapping frá Vestmenningi í dag.

Hann segði eisini, at hann visti av, at hetta kundi blíva sigur nummar 30.

- Ja, eg visti av tí, men hetta var ikki nakað, sum eg hugsaði ordiliga um. Vit vunnu tó róðurin, so nú er sigur nummar 30 komin í hús.

At enda spurdu vit Ludvík, um ólavsøkuróðurin bleiv hansara síðsti róður, ella um hann ætlaði at halda fram komandi ár.

- Nei, eg ætli mær ikki at halda fram komandi ár. Eg fari eftir at vinna 31 róðrar á hesum sinni, tí ólavsøkan skal eisini vinnast. Eg skal tó ikki siga við vissu, at eg ikki byrji aftur. Møguliga fari eg at rógva aftur eina ferð í framtíðini, sigur Ludvík við Stein at enda.

Sum vit skilja, so ætlar Tóroddur Vang sær eisini at gevast eftir hetta kappingarárið.

# Heiðabáturin hevur fult stigatal

**Heiðabáturin vann sætti róðurin á rað í ár, tá teir endaðu fremst á vestanstevnu, men hesu ferð fingu teir harða kapping frá reyða Argjabátinum, sum førdi stóran part av róðrinum**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Heiðabáturin hevur vunnið trygt á hvørjari stevnu í ár, og tí vóru teir stórir favorittar at vinna 8-mannafarsróðurin á vestanstevnu leygardagin. Einasti báturin, sum undan róðrinum sá út til at kunnu geva Heiðabátinum kapping, var Árnfirðingur, sum hevur tikið seg sera nógv fram síðstu róðrarnar.

Tað var tó ikki Árnfirðingur, sum gav Heiðabátinum kapping hesaferð men í staðin var tað Argjabáturin, sum rættiliga beit frá sær fyrstu longu løtuna. Argjabáturin legði nevniliga sera væl fyri, og eina løtu vóru teir eina heila bátslongd framman fyri Heiðabátin.

So við og við raknaðu teir tó við á Heiðabátinum, og spakuliga ótu teir meir og meir av leiðsluna hjá Argjabátinum. Argjabáturin royndi tó alla tíðina at halda fast um leiðsluna, og tá bátarnir báðir fóru undir endaspurtin, var at kalla eingin munur millum teir.

Í endaspurtinum var Heiðabáturin tó sterkari, og vann við eini hálvari bátslongd niður til Argjabátin. Við sigrinum eru teir á Heiðabátinum enn ósigraðir í ár, men Argjabáturin vísti, at tað ber til at steðga Heiða-



*Argjabáturin gav harða kapping, men í endaspurtinum megnaðu teir tó ikki at taka Heiðabátin av Glyvrum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*